# Nøvn

## Dynamit – betri enn nakrantíð

Eg siti í mínum kamari og lurti. Eg lurti eftir einum sonnum meistaraverki, og eg kenni allar sangirnar uttanat. Eg lurti eftir einari live-upptøku av Dynamit, har teir syngja og spæla á Summarfestivalinum. Henda fløgan, eg eri farin í holt við at lurta eftir, steðgar ikki á í fløguspælaranum, tí tað er ikki ein sangur á fløguni, sum eg ikki vil lurta eftir. Í mong ár hevði eg fløguna hjá MC-Hár: *Framvegis uttan vit* sum favorit innan føroyskan tónleik, men tað fløguna hevur nú *Dynamit Live* skúgva til viks. Nú liggur hon nummero uno hjá mær.

Fløgan byrjar soleiðis: *Teir syngja illa, og teir spæla illa. Og sangirnir hjá teimum eru ikki bara vánaligir – teir eru elendigir. Tað er bara eitt, sum er verri enn at hoyra teir á fløgu, og tað er at hoyra teir live. Mínar dámur og harrar, hesir mennirnir eru so primitivir, at heilin fær skaða, tá man lurtar eftir teimum. Ok, hviss ummælarnir høvdu rátt, so slapp Dynamit slett ikki á pallin í kvøld – Dynamit høvdu verið settir í eitt sinnissjúkrahús. Men tað eru ikki ummælarnir sum ráða – tað eru tit sum ráða. Hvat siga tit – Vilja tit hava Dynamit? Tit fáa Dynamit – ger so væl..! DYNAMIT ..!*

Ímeðan rópað verður í mikrofonina, um vit vilja hava Dynamit, verður rópað av fjøldini: *JAAAA ..!* Og síðan byrjar Niclas Heri Jákupsson at syngja sangin *Rudolf*, sum síðan verður mixaður við sanginum hjá Queen *We will rock you*, sum Hans Jacob Nystrøm syngur. Man hoyrir á fløguni, at fjøldin kókar, og minnist eg eisini konsertina á Summarfestivalinum, har Shaky, tað vil siga Hans Jacob, sang á takinum á Politistøðini. Og má eg siga, at tá ein lurtar eftir fløguni hjá *Dynamit Live*, so verður ein mintur á Føroya feitastu konsert ... nakrantíð ..!

Allir klassikara eru á fløguni. *Sangir so sum: Bangin, Til allar kvinnur, Á lat meg vera, Aja umba, Grøv nr. 13* og sjálvandi *Pápi tín býr ei í Tórshavn* og eru allir á fløguni, og eisini fylgir ein dvd-fløga við, sum er ein dokumentar um orkestrið. Eg dugi ikki at seta orð á, hvussu væl mær dámdi fløguna, men tað er nærum hvønn dag, at eg lurti eftir henni og serliga stuttligt er at lurta eftir sanginum *Pápi tín býr ei í Tórshavn*, har øll fjøldin syngur við og dugir allan sangin uttanat. Og her verður altso tosað um 10.000 fólk, sum tá vóru á Summarfestivali.

Dvd-fløgan, sum eisini fylgir við, er simpulten eitt must fyri allar Dynamit fjeppara, og sjálvandi er tónleikafløgan eisini tað. Eg kundi kanska ummælt fløguna við einum orði, nevniliga: BRAVO ..!

Og eigur tú ikki fløguna *Dynamit Live* – jamen so keyp hana og døm um tað sjálvir og lat ikki nakrar ummælarar frá Útvarpinum oyðileggja gleðina yvir at lurta eftir nøkrum wellum klaksvíksingum, sum totalt rokka ! Rock on, Dynamit!

**Jógvan á Høvdanum, yngri**






Vinnustykki til sølu

Mykinesgøta 9, 100 Tórshavn

Stødd: 1968 m²

Hevur hetta tín áhugað, ert tú vælkomin at ringja á tel 214453
ella senda ein teldupost til mb@mb.fo

MOURITSEN'S BUSSAR

Loysnir


## Søgan um jødarnar

Sendiróðin, Søgan um jødarnar, hjá Sonna Smith, journalisti, og Hans Holm, lektara, í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya, kemur nú út í bók

Um tað seinasta mundið – í 1996/97 – tá ið Hans Holm, og Sonne Smith gjørdu tær mongu sendingarnar fyri Útvarp Føroya um øll heimsins lond og fólk, komu teir ásamt um at fremja eitt fleiri ára gamalt hugskot í verki: Søguna um jødarnar.

Við teirri miklu og objektivu vitan, Hans Holm hevði um evnið, fór hetta at verða tað higartil einasta føroyska væl skjalfesta, søguliga tilfarið, føroyingar fóru at eiga um ta ótrúligu søguna um





jødarnar heilt frá teirri løtu, patriarkurin Ábraham fór úr Ur í Kaldea í núverandi Irak við sínum fólki og fæ, og til okkara dagar.

Søgan um jødarnar varð endursend í 2009 í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya, og mong spurdu Sonna Smith tá, um hann kanska ikki átti at roynt at givið tilfarið út í bók.

Frásøgnin er skrivað niður og kemur nú út í bók á Forlagnum Smith.

Bókin er styðjað við mongum myndum og viðkomandi myndateksti.

Søgan um jødarnar er ætlað sum undirvísingartilfar og skjalsannað, áhugavert, hugtakandi og spennandi søguligt tilfar, sum øll kunnu ogna sær.

Framløga er á Sendistovuni í Jóannesar Paturssonar gøtu í Havn týsdagin, 2. november klokkan

## Nýtt grannskoðarasamtak stovnað

Grannskoðaravirkini MENTA og GrannskoðaraStovan hava tikið seg saman í grannskoðarasamtakið ERFA. ERFA er ætlað sum eitt fakligt samstarv millum feløgini, við høvuðsendamálinum at menna eitt fakligt umhvørvi og vitanina um høvuðsyrkini roknskap, grannskoðan og ráðgeving. Eisini er ætlanin at samstarva um størri uppgávur.

Øktu krøvini til góðkendar grannskoðarar hava m.a við sær eina kravda eftirútbúgving og góðskustýring. ERFA hevur ætlanir um at skipa fyri viðkomandi skeiðum og at bjóða skeiðini alment út til onnur áhugað. Hetta kann lætta um hjá øðrum góðkendum grannskoðarum, sum kunnu fáa tann partin av útbúgvingini í Føroyum, so ikki øll útbúgvingin verður neyðug at fáa uttanlands.

Tey fyrstu skeiðini verða longu nú í november.

Í ERFA samtakinum starvast tilsamans 19 fólk, harav 6 eru skrásettir grannskoðarar og eru feløgini í samtakinum førar fyri at átaka sær allar grannskoðanar- og ráðgevingaruppgávur.

Samtakið hevur eina heimasíðu www.erfa.fo, har fleiri upplýsingar kunnu fáast.